

Minningarorð um

# Súsonnu Hansen

Hósdagurin 9. mars 2000 var ein sera vakur og sólríkur dagur. Ein av teimum bestu døgunum, ið vit hava havt higartil í ár. Eingin hevði væntað, athesin dagurin skuldi blíva so óhugnaligur. Tú góða Súsanna bleiv tikin frá okkum – bert 19 ára gomul.

Tað kennist so sera løgið, at tú ikki ert ímillum okkum meira. Tú vart altíð so glað og hevði altíð eina hjálpandi hond til reiðar. Vit báðar hava kent hvørjaaðra í fýra ár. Vit gingu í 10. flokki í Tvøroyrar skúla saman, eg gekk í b-flokkinum og tú í a-flokkinum. Eftir 10. flokk fóru vit á studentaskúla í Vági og har komu vit at ganga í sama flokki. Tú vart ein sera dugnaligur næmingur og fekk altíð teir flottastu karakterirnar, og hevði nakar uppiborið eitt studentaprógv, so var tað tú góða Súsanna. Vit hava so nógv at takka tær fyri. Tá okkara flokkur skuldi námsferð til Rom, vart tú tann, ið skipaði fyri næstan øllum tiltøkunum, ið vit høvdu. Uttan teg vóru vit ikki komin til Rom.

Tað er so sera meiningsleyst, at tú skuldi doyggja so ung góða Súsanna. Tú vart í tínum besta blóma og hevði alt lívið framman fyri tær og tí hevði tú stórar ætlanir við. Men Jesus pápi vildi hava teg heim til sín at vera.

Eg hugsi nógv um tykkum bæði Marnu og Karl. Tit hava mist tykkara einasta barn. Jesus pápi verið hjá tykkum og styrkið tykkum og tykkara nærmastu.

Góða Súsanna, eg vil takka tær fyri fýra góð vinaár. Eg fari ongantíð at gloyma teg og eg veit, at vit báðar skulu møtast aftur ein dag.

Hvíl í friði og takk fyri alt.

**Ritha**

# Birthe Helene f. Djurhuus og Jacob C. F. Olsen

f. 24.08.1916 – d. 04.10.1999 f. 04.04.1902 – d. 12.06.1963

**At føðast hevur sína tíð**
**at doyggja hevur sína tíð**
**at gráta hevur sína tíð**
**at læa hevur sína tíð**
**at dansa hevur sína tíð**
**at missa hevur sína tíð**
**at syrgja hevur sína tíð**

Eitt skeið í tilveru okkara er av. Mamma hevur lagt frá sær og svevur nú deyðans blund saman við pápa. Pápi varð bert 61 ára gamal, og mamma rakk gott og væl kempualdur. Vit fýra systkini hava býtt okkara millum tað, sum var inni hjá okkum. Vit hava hildið á nógvum og eru komin fram á mangt, sum hevur mint okkum á farnar dagar – á tey sorgleysu barnaárini, tá vit øll vóru saman. Okkurt, sum vit sjálvi sum børn góvu foreldrum okkara – sprellimannin, sum pápi gjørdi okkum – ta »fínu« smørskálina, sum bert varð brúkt um høgtíðirnar – hin dýra blýantsspískaran hjá pápa – bindi- og hekliuppskriftirnar hjá mammu – ummælisbókina hjá pápa – mannakornini hjá mammu og onnur ting, sum hoyrdu til inni hjá okkum. Seinasta kvøldið, áðrenn systirin, sum býr í Danmark, fór av stað aftur, høvdu vit eina skilnaðarstund, og vit tosaðu nógv um mammu og pápa.

Mamma pápa var úr Knútsstovu í Havn og pápi hansara var av Toftanesi í Leirvík. Mamma mammu var úr Streymnesi og pápi hennara var av Strondum. Pápi okkara var føddur í Oyndarfirði og búði har til hann var 5 ára gamal, tá fluttu tey til Havnar. Mamma okkara var fødd í Hósvík og 14 ára gomul fór hon til Havnar at tæna. Pápi hevði síni foreldur, til hann var um 30 ára gamal, men mamma var longu 14 ára gomul foreldraleys. Pápi var 37 ár og mamma var 23 ár, tá tey giftust, so vit fýra systkini hava ongantíð havt ommur ella abbar hjá okkum. Tað kann tykjast nakað fátæksligt, men vit halda ikki, at vit saknaðu tað so nógv, tí familjan er stór – serliga tann hjá mammu – og vit høvdu nógv samband við hana. Mamma og pápi giftust beint fyri kríggið, og tá var ivaleyst mangan tungt bæði hjá teimum og øðrum at fáa endarnar at røkka saman.

Mamma var heima og pápi arbeiddi ofta langar dagar og hann teknaði og málaði um kvøldarnar. Mamma var tann praktiski parturin í teirra hjúnalagi og pápi var (vit kunnu kanska siga) spælibarnið. Mamma var sterk og røsk og gjørdi at kalla alt tað handaliga, pápi tók sær av tí skrivliga. Áðrenn pápi setti seg at tekna og mála um hvøldarnar, plagdi hann, sum mamma segði, at verma upp, vi ðat tekna ymiskt fyri okkum, sum vit so skuldu gita. Hetta dámdi okkum sera væl og tað var spennandi, tí ikki fyrr enn hann teknaði náttpottin, gavst hann. Tá vit fingu bøkur at lita í jóla- ella føðingardagsgávu, skuldi pápi altíð lita minst eina síðu í teimum. Mamma sang ofta fyri okkum. Hon lærdi okkum barnarímurnar hjá Hans Andriasi, skjaldur, tættir og kvæði. Eisini tá vit vóru løgst um kvøldarnar, sang hon og sum tann praktiska konan hon var, sat hon í køkinum við stokkum og læt so dyrnar standa opnar inn í kamarið til okkum. Pápi kom altíð at signa okkum, tá vit vóru niðurfarin. Mammu dámdi eisini so væl yrkingar, og tað lá væl fyri hjá henni at yrkja, og hon yrkti ofta til ymisk høvi í familjuni. Eisini hevði mamma stóran tokka til Frelsunarherin, og hon hávirdi tann gerning stovnarin William Booth byrjaði í London. Vit systkin gingu í sunnudagsskúla og vóru skótar hjá Frelsunarherinum í Havn.

Av tí at pápi hevði tær gávur, at hann dugdi at tekna og mála, varð hann kendur fyri síni jólakort, tekningar í jóla- og skúlabókum, skreytbløð, myndir, leikstjøld og mangt annað; mamma hevði ikki tær gávurnar, men hon syrgdi fyri at hann altíð kundi seta seg at skapa, og so tók hon sær av øllum tí húsliga arbeiðinum, eisini tí, sum menn gjørdu í øðrum heimum. Vit børn hugsaðu ikki so nógv um tað, tað átti bara at vera so.

Ímillum tey ting, ið lógu inni hjá okkum, vóru scrapbøkur og ringbind, og har var nógv at síggja og lesa. M.a. hesar báðar yrkingarnar, sum vit prenta niðanfyri. Aðra yrkti Louis Zachariasen til pápa, tá pápi fylti 50 ár og hina yrkti Svanhild Zachariasen til mammu, tá mamma fylti 65 ár. Heima hjá okkum var tað helst sum hjá teim flestu, har var ofta gangur, skem og málageip, men har var eisini hátíðarligt og ikki minst hugni. Har lærdu vit siðir og atburð, rætt og órætt, gaman og álvara.

Í dag siga vit, at vit eru takksom fyri okkara foreldur og fyri barnaheimið, sum gav okkum lívd og hvíld, friðskjól og tryggleika.

Vit lýsa frið yvir minnið teirra.

**Ingibjørg, Marjun, Jákup og Karin**



*Jákup og Birtelena í Keypmannahavn í 1949*

*Tú sást og tók tær ýti, hvar nakað ýti var,*
*og sjón tín for so víða, langt út um eingjargarð.*
*Hvørt litafyribrigdi og heildina í mátti,*
*alt fataði títt eyga, í sama andadrátti.*

*Tá vuksu myndir vakrar fram fyri tíni sjón,*
*so lív varð kveikt úr deyða. Nú komið er í nón,*
*vit ynskja vesturskin títt vil Føroyum fløva leingi*
*og ungum ættum boð frá aðalbornum dreingi.*

**Louis Zachariasen**

*Borin í heim í lítlari bygd*
*gird við fjøllum, prýdd við áum,*
*í lágari smáttu tú hevði búgv*
*– fossar runnu í gjáum –.*

*Lítil og smæðin var henda smátta,*
*fevndi tó um stór og um smá,*
*mongum gav hon trygd fyri ótta,*
*tá veðrið ringa herjaði á.*

*Áargrind og skeljamatur*
*dagligur kostur var,*
*stórur pottur við gapandi øðum*
*varliga varð tikin úv.*

*Spældi í haga og á sandi,*
*á nýslignum hógvi at renna dyst,*
*flogsaðist so flættubandið*
*við eitt var burturmist.*

*Í ósa maðkapirrur at fanga*
*í rimli állukálvar*
*eftir rottugøtuni kláraði at ganga*
*– eitt bragd, ein hámetti sjálvur –.*

*Á torvheiðar tú noyddist ganga*
*– ikki av fríum vilja –*
*rann undan tarvi, ið dámdi sær at stanga,*
*leypur og tú máttu skiljast.*

*Fermd tú vart í nýggjari kirkju,*
*høgtíðsdámur yvir bygdini lá,*
*har tú skuldi um bandið styrkja*
*til vegin fyri framman lá.*

*Loknir vóru barnadagar,*
*ævintýrið ein enda fekk.*
*og tú leitaði burtur hagar,*
*hvar øll og alt eftir klokku gekk.*

*Nú tú rundar sekstifimm*
*árini bert vú væl,*
*hóast brim og brotasjógvar*
*høvdið ei undir var.*

*Vit tær takka fyri hesa løtu*
*og fyri mangar slíkar,*
*tillukku vit siga og leypa á føtur,*
*leingi livi tú ár, dagar og tímar.*

**Svanhild Zachariasen**



## Undirvísingar- og Mentamálastýrið

# Stuðul til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari

Á fíggjarløgtingslógini 2000 eru kr. 400.000 játtaðar til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari.

Tey, ið arbeiða við ella ætla at fara undir at framleiða føroyskt loftmiðlatilfar, eru vælkomin at søkja.

Umsókn við lýsing av verkætlan, tíðarætlan, fyribils óbindandi tilsøgn um programseting frá avvarðandi útvarps- ella sjónvarpsstøð, og fíggjarætlan fyri verkætlanina skal sendast til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Postrúm 3279 - 110 Tórshavn**
**Telefon 35 50 50 — Telefax 35 50 55**
**e-postur.: umms@umms.fo**

Umsóknarbløð fáast við at venda sær til Undirvísingar- og Mentamálastýrið ella á heimasíðuni: http://www.umms.fo/Mentan/umsokn.htm

Umsóknarfreistin er **mikudagin 7. juni 2000**. Tey, ið vilja hava meira at vita um stuðulin, eru vælkomin at venda sær til Undirvísingar- og Mentamálastýrið.

# Frá Runavíkar býráð

Við hesum skal verða mint á at bøgarðarnir skulu vera í seyðahøgum standi í seinasta lagi 15. mai 2000.

Runavíkar býráð

# Ársaðalfundur

Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag hevur ársaðalfund **Kristi himmalsferðardag, 1. juni 2000 kl. 15.00 í missiónshúsinum í Leirvík.**

Fundarskrá:
1. Ársfrágreiðing
2. Ársroknskapur
3. Val av nevndarlimum
4. Val av tiltakslimi
5. Val av grannskoðara
6. Ymist

Uppskot, sum limir ynskja at koma til viðgerðar á aðalfundi, og uppskot til nevndarlimir mega vera formanninum, Una Næs, 530 Fuglafjørður, í hendi 8 dagar framman undan aðalfundinum.

Í sambandi við aðalfundin verður eisini alment møti í missiónshúsinum í Leirvík kl. 19.00.

**Nevndin**

KPMG

# Grannskoðarar við royndum og ungir grannskoðarar

Orsakað støðugt vaksandi virksemi og av tí at tveir av okkara grannskoðarum fara at fáa sær víðari útbúgving hjá ávíkavist KPMG í Keypmannahavn og KPMG í Madrid, hava vit brúk fyri at seta fleiri grannskoðarar í starv til heystar.

**Starvslýsing**
Arbeiðið fevnir um grannskoðan, roknskaparhjálp og eina røð av øðrum tænastum til føroyskar og útlendskar privatar fyritøkur innan flest allar vinnugreinar, eins og til kommunur og almennar stovnar v.fl.

## Grannskoðarar við royndum og/ella við ástøðiligari útbúgving

**Útbúgvingin**
Umframt at fáa hollar arbeiðsroyndir gjøgnum tað dagliga arbeiðið, skulu tey, sum verða sett í starv, nema sær víðari ástøðiliga útbúgving.

Harumframt verður talan um innanhýsis undirvísing, bæði hjá okkum og hjá KPMG í Danmark.

**Umsøkjarin**
Roknað verður við, at umsøkjarar hava útbúgving sum siviløkonomar (HA), hava lokið HD-prógv ella cand.merc.aud., og eru áhugaðir at halda fram við at útbúgva seg.

Eisini er tað eitt krav, at viðkomandi er fryntligur og fyrikomandi, og til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, serliga fyrru helvt av árinum.

**Framtíðarmøguleikar**
Møguleiki er fyri at nema sær tær praktisku og ástøðiligu royndirnar, sum skulu til fyri at gerast statsautoriseraður grannskoðari.

## Ungir grannskoðarar

**Útbúgvingin**
Umframt at fáa hollar arbeiðsroyndir gjøgnum dagliga arbeiðið, skulu okkara starvsfólk nema sær ástøðiliga útbúgving við at fylgja HD-undirvísingini á Føroya Handilsskúla. Harumframt verður talan um innanhýsis undirvísing, bæði hjá okkum og hjá KPMG í Danmark.

**Umsøkjarin**
Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava lokið HH-prógv, og verða áhugaðir í framhaldandi útbúgving.

Eisini er tað eitt krav, at viðkomandi er fryntligur og fyrikomandi, og er til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, serliga fyrru helvt av árinum.

**Framtíðarmøguleikar**
Aftaná lokið HD-prógv er møguleiki fyri at halda áfram at nema sær ástøðiligu útbúgvingina cand.merc.aud., sum er neyðug fyri at gerast statsautoriseraður grannskoðari.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda okkum skjótast gjørligt ella í seinasta lagi innan 15. mai 2000.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Mirjam Haraldsen á telefon 34 34 34.

***KPMG í Føroyum er føroysk ogn burturav. Samstundis eru vit limir í KPMG International, sum er eitt tað største grannskoðanarsamtakið í heiminum.***
***Okkara mál er at veita tænastur innan grannskoðan, roknskaparhjálp, fíggjarstýring, skatt og mvg v.m. á hægsta góðskustigi.***
***Í Føroyum hava vit ein góðan og breiðan kundaskara bæði innan handil, ídnað, peningastovnar og fíggjarstovnar eins og kommunur og landið.***
***Støðuga útbúgvingin av starvsfólkunum og góðskustýring okkara ger okkum væl fyri at loysa tær uppgávur, sum verandi og komandi kundar, bæði føroyskir og útlendskir, ynskja loystar av okkum.***
***Í løtuni starvast 22 fólk hjá felagnum.***

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34, Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo, E-mail: kpmg@kpmg.fo

team 85 • 31 65 11

**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*
**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*
**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*
ADC
**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

**DANNY TRANSPORT**
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
**Tlf. 319192**